# Val og fólkaatkvøða sama dag

**Vestmanna:** Samstundis sum vestmenningar skulu velja nýtt løgting, skulu teir eisini til eina vegleiðandi fólkaatkvøðu um samanlegging millum Vestmanna og Kvívíkar kommunur, og til støðutakan um val av samstarvseind.

Annar parturin av fólkaatkvøðuni verður gjørdur sambært lógini um sjálvbodna kommunusamanlegging, har staðfest verður, at hesar báðar grannakommunurnar eru tær einastu sum skulu velja hvørja samstarvseind tær vilja verða partur av. Henda lógin staðfestir somuleiðis, at Vestmanna og Kvívíkar kommunur skulu verða partur av somu samstarvseind.

Tríggir valmøguleikar eru at tala støðu til, tá talan er um samstarvseind: Tórshavnar kommuna, Sunda kommuna ella tær tríggjar kommunurnar í Vágum – Sandavágur, Miðvágur og Sørvágur. Sagt verður, at ein samstarvseind skal skipast áðrenn 1. oktober í ár, tí annars fer Innlendismálaráðið at velja eina slíka.

Henda vegleiðandi fólkaatkvøðan leygardagin í næstu viku snýr seg ikki um at leggja kommunur saman, men er ein spurningur um eina samstarvseind.

-Henda samstarvseindin avmarkar tó møguleikarnar at leggja saman. Velja vit til dømis Vágar sum samstarvseind, so ber bert til at leggja saman við Kvívík ella kommununum í Vágum, verður sagt úr Vestmanna.

Bygdarráðið í Vestmanna heldur tað vera eitt gott høvi hjá fólki at siga sína hugsan um hetta málið, soleiðis at tað hevur møguleika at fyrireika eina møguliga kommunusamanlegging í framtíðini.

Sagt verður, at fær eingin av teimum trimum valmøguleikunum meiri enn helmingin av atkvøðunum, verður nýggj fólkaatkvøða beinanvegin. Tá verður valt millum tær báðar samstarvseindirnar, sum fingu flestar atkvøður.

**sb.**



*Nógv virksemi er í Vestmanna. – Fólk vilja fegin búseta seg her, sigur borgarstjórin, Karl A. Olsen*

# Vestmenningar gera íløgur fyri 15 mió krónur

**Stórur áhugi er fyri at búseta seg í Vestmanna. Kommunan fyrireikar tí enn eina útstykking, og hevur sett pening av til hesa á fíggjarlógini í ár.**

**KOMMUNUR**

*Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*

**Vestmanna:** - Tað eru allatíðina onkur sethús í gerð her í bygdini, sigur borgarstjórin, Karl A. Olsen.

Áhugin hjá fólki at búseta seg í bygdini er stórur, og kemur hetta helst eisini av, at rættiliga nógv arbeiði er í bygdini í løtuni.

Kommunan eigur fleiri grundøki tøk á einum staði ovarlaga í bygdini, men tað tykist sum um fólk heldur vilja búgva niðarlaga í bygdini.

Í ár hevur kommunan játtað eina kvart millión krónur millum annað til at fyrireika eina útstykking uttanfyri Miðalsbrekku.

Annars ætlar kommunur at fremja íløgur fyri íalt 14,5 mió krónur í ár. Hetta eru tvær mió meiri enn í fjør.

## Lægsta gjald

Henda hækkaða játtanin til íløgur í ár, skal eisini síggjast í ljósinum av, at inntøkurnar í ár eru mettar til 3 mió krónur meiri enn í fjør.

Hóast undirskot er á fíggjarlógini, verður skattaprosentið tað sama, nevniliga 22, eins og barnafrádrátturin er óbroyttur uppá 3500 krónur.

- Hesin frádrátturin er millum teir lægru í landinum, men vit halda kortini at barnafamiljurnar hava rættiliga góðar umstøður í kommununi, sigur Karl.

Hetta sæst aftur í, at foreldragjaldið í dagstovnunum er millum tey lægstu í landinum.

Haraftrat er skuldin í kommununi farin væl niður um eina álíkning, og tí fær kommunan betri møguleikar at skipa síni fíggjarligu viðurskifti enn undanfarin ár.

## Nógv virksemi

Umframt tey teknisku málini, sum fara við 9 mió krónum av íløgunum, eru 3 mió játtaðar til nýggja røktarheimið í bygdini.

Ætlanin var upprunaliga at byggja hetta røktarheimið á Fornlendi, men í mars mánaði í fjør varð avgerð tikin um at flyta tað út á Grønanes.

- Flytingin seinkaði bygginingini nakað, men ætlanin er at byrja arbeiðið í ár, sigur borgarstjórin við Sosialin.

Annars er nógv virksemi í Vestmanna í hesum døgum. Nýggi Fiskivinnuskúlin er í gerð, eins og ein frystigoymsla.

Bygdarráðið vónar eisini, at fara undir arbeiðið at gera miðstaðarøkið í ár.

- Tá hetta er liðugt, fer bæði handilsvinnan og tænastuvinnan í Vestmanna at fáa munandi betri umstøður, slær borgarstjórin fast.

# Nýggjur skúli til Sandsbørn

**Umsíðir er líkt til, at børnini heima á Sandi fáa tann nýggja barnaskúlan. Tann verandi er meiri enn 120 ára gamal, og er ikki tíðarhóskandi longur.**

**SKÚLI**

*Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*

**Sandur:** Arbeitt hevur verið við hesi ætlanini í fleiri ár.

Fólk úr kommununi, skúlastýrinum og lærarar hava hesa tíðina tosað saman um krøv, støðd og annað í sambandi við ætlaða skúlan.

Á bygdaráðsfundi í kvøld kl. 20 fer so Sands bygdaráð at taka endaliga støðu til skúlan. Og aftaná fundin skal byggisáttmálin undirskrivast.

- Her verður talan um ein góðan barnaskúla til dagsins standard, hevur borgarstjórin, Páll á Reynatúgvu áður sagt við Sosialin.

Í uppskotinum verður eisini tikin hædd fyri einum hugsandi fólkavøkstri, nú avgerðin um Sandoyartunnilin er tikin.

Gamli bygdarskúlin hevur tænt fyri seg í sløk 125 ár. Her vóru upprunaliga tvær skúlastovur og íbúð til læraran.

Hóast broytingar eru gjørdar í bygninginum, eru tær ikki nóg mikið til at hann nøktar dagsins tørv á einum barnaskúla. Tí hevur ein arbeitt við ætlanini um ein nýggjan bygdarskúla.

Nú er umsíðir líkt til at farast kann undir henda skúlan. Og sum skilst er talan um ein sera snotuligan bygning.



*Børnini á Sandi sleppa um nøkur ár í nýggjan barnaskúla*